Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Sirið Stenberg

Svarari: Løgmaður

Evni: Tilmælið um heimauppihald við komu til Føroyar

Spurningar:

1. Hvør er orsøkin til, at tilmælið um heimauppihald við komu til Føroyar varð slept ?
2. Hevur fakkunnleikin viðmælt at taka tilmælið um heimauppihald burtur ?
3. Er ætlanin at seta tilmælið um heimauppihald við komu til Føroyar í gildi aftur ?

Viðmerkingar:
Nú koronusmittan hevur tikið seg upp aftur, undrast mong á, hví tilmælið um heimauppihald við komu til Føroyar varð slept. Serliga sæð í ljósinum av, at tilmælini innanlands í Føroyum eru linkað sera nógv. Fakmyndugleikin hevur sagt alment, at tamarhald er ikki á støðuni.

Hesir spurningar verða settir løgmanni fyri at fáa greiðu á, um ætlanin er at broyta tilmælini aftur og mæla til, at ferðandi fara í heimauppihald við komu til Føroyar.

Á Løgtingi, 8. juni 2021

Sirið Stenberg